Dagf. 7. oktober 2020
HMR J. nr. 20/00817-6

Kaj Leo Holm Johannesen
landsstýrismaður

Svar

upp á

fyrispurning nr. 24/2020 eftir § 52a í tingskipanini um bíðitíðir í sjúkrahúsverkinum, frá Sirið Stenberg, løgtingskvinnu

Spurningurin var soljóðandi:

1. Hvussu gongur við at stytta bíðilistarnar í sjúkrahúsverkinum, sum komu í orsakað av koronu?
2. Hvussu nógvar viðgerðir færri eru samanlagt framdar higartil í ár sammett við í fjør?
3. Hvussu er samlaða talið á viðgerðum í ár sammett við í fjør býtt á ymisku sjúkuøkini?
4. Hvat verður ítøkiliga gjørt fyri at fáa bíðlistarnar niður?
5. Er nøkur kostnaðarmeting av, hvat tað kostar at fáa viðgerðartalið á har, sum mett varð, at tað átti at verið, um korona ikki var? Og rúmast kostnaðurin innan verandi játtan?
6. Eru tað gjørdar nakrar metingar av avleiðingunum fyri sjúklingarnar, at virksemið hevur verið so skert vegna koronu?
7. Hvat verður gjørt fyri at fyribyrgja, at sjúklingar, sum ikki fáa viðgerð, fáa álvarslig mein og missa førleikar í bíðitíðini?

Svar:

Til spurning 1
Tað er eitt sindur ójavnt, hvussu væl tað gongur at stytta bíðilistarnar, sum stóðust av koronu. Á fleiri økjum gongur væl, men á skurðøkinum – serliga í ortopediini - og í fysio- og ergoterapiini eru avbjóðingar á øllum trimum sjúkrahúsunum. Haraftrat eru bíðilistarnir í pørtum av psykiatriini framvegis longri, enn áðrenn koronasmittan tók seg upp í Føroyum.

Til spurning 2
Tá vit samanbera fyrstu 9 mánaðirnar í 2020 við í fjør, er samlaða minkingin av ambulantum kanningum og viðgerðum eini 3-4 prosent. Talið av kanningum og viðgerðum er gott 3000 lægri enn um somu tíð í fjør. Seinnu árini, hevur vøksturin verið 7-8 prosent um árið.

Til spurning 3
Sum nevnt omanfyri, so rakti koronasmittan summi øki harðari enn onnur. Skurðøkið, er eitt av økinum, sum varð meinast rakt og samanborið við 2019, so hava verið millum 15 og 20 prosent færri skurðviðgerðir í Sjúkrahúsverkinum í ár. Minkingin er størst á Landssjúkrahúsinum og minni í Klaksvík og í Suðuroy. Um vit taka allar ambulantu kanningarnar og viðgerðirnar á skurðøkinum við, so er minkingin 3-5 prosent.

Á medisinska økinum er samlaða minkingin 4 prosent. Seinnu árini hevur vøksturin annars verið ógvuliga stórur á økinum. Í miðal er talið av vitjanum vaksið við 15 prosentum um árið seinastu 5 árini. Ein av orsøkunum til, at minkingin ikki er størri, er, at talið av telefonviðtalum í ár er økt við út við 80 prosentum í mun til í fjør.

Seingjardeildirnar á Landssjúkrahúsinum hava yvirhøvur havt javnt virksemið alt árið, eisini tá koronasmittan herjaði í vár, og koronaátøkini við nýskipaðari koronadeild hava skapt meira virksemið. Hinvegin vóru hetta tíðarskeiðið færri innleggingar á Klaksvíkar sjúkrahúsi og Suðuroyar sjúkrahúsi.

Øll trý sjúkrahúsini hava havt stóra minking í fysio- og ergoterapiini, har virksemið samlað er minkað minst 20 prosent higartil í ár.

Á psykiatriska økinum er samlaða minkingin í ambulantum kanningum og viðgerðum lítil, bert 1-2 prosent. Men her er týðandi at vísa á, at vanliga veksur ambulanta virksemið í psykiatriini við meira enn 7 prosentum um árið. Í psykiatriini er talið av telefonviðtalum vaksið við 32 prosentum, meðan talið av heimavitjanum – økispsykiatriin – er minkað 23 prosent.

Til spurning 4
Sum greitt frá omanfyri, so eru tað ikki øll øki, sum eru eins hart rakt av koronu. Givið er, at summi sjúkuøki betri kunnu finna nýggjar og øðrvísi loysnir, til tess at halda virkseminum í gongd – eitt nú við fleiri telefonviðtalum. Onnur øki, har tað er neyðugt, at sjúklingurin kemur á staðið, hava verið harðari rakt.

Yvirskipað eru átøk gjørd fyri at tryggja, at virksemið í so stóran mun sum gjørligt kann halda fram hóast koronu. Koronadeild er skipað í lonum uttanfyri sjálvt sjúkrahúsið, sum tekur ímóti sjúklingum við koronu, og tá illgruni er um koronu. Haraftrat eru gjørd smittuverjuátøk innanhýsis.

Í heila tikið hava starvsfólkini tikið nøkur ódnartøk, fyri at so nógvir sjúklingar sum gjørligt kunnu fáa viðgerð. Á nøkrum økjum hevur eyka orka verið sett inn eftir summarsteðgin, og arbeitt hevur verið longur út á dagin. Á Klaksvíkar sjúkrahúsi eru eyka læknar boðsendir til at gera eitt nú skurðviðgerðir og kikarakanningar.

Tað er einki dulsmál, at bíðitíðin er vaksin í ortopediini. Orsøkirnar eru fleiri, bæði læknatrot og alsamt fleiri ávísingar. Tí var koronasmittan í hesum høpi steinur oman á byrðu. Sjúkrahúsverkið arbeiðir við at greina málið nærri og finna loysnir, til tess at fáa bíðilistarnar niður, sum í løtuni eru órímiliga langir.

Til spurning 5
Sjúkrahúsverkið hevur ikki gjørt eina samlaða kostnaðarmeting av, hvat kostnaðurin er at fáa bíðilistarnar niður á sama støði, sum áðrenn koronu. Landssjúkrahúsið gjørdi tó eina meting av skurðøkinum í samráð við Búskaparráðið, tá heystfrágreiðingin hjá ráðnum varð løgd fram. Tá varð mett, at fíggjarligu avleiðingarnar av koronu vóru umleið 16 mió. kr. harav 4 mió. kr. fyri ortopedi.

Fyri øll økini er galdandi, at um eyka starvsfólk skulu setast – konsulentar og onnur - fyri at fáa bíðilistarnar niður, rúmast hesin kostnaðurin ikki innan verandi játtan. Sjúkrahúsverkið arbeiðir sum nevnt við at greina málið nærri og finna loysnir, til tess at fáa bíðilistarnar niður.

Til spurning 6
Tað er týðandi at undirstrika, at allir sjúklingar, sum hava havt bráðneyðugan tørv, hava fingið viðgerð. Í hvørjum einstøkum føri, hevur serlækni ella annað heilsustarvsfólk gjørt eina ítøkiliga heilsufakliga meting av støðuni hjá sjúklinginum. Hinvegin er tað neyvan ein fyrimunur at bíða longri enn neyðugt eftir einari kanning ella viðgerð.

Til spurning 7
Sum nevnt omanfyri, hava starvsfólkini í Sjúkrahúsverkinum samskift við sjúklingarnar, og í teimum førum, tá støðan hjá sjúklinginum er versnað, eru tey sloppin framat.

Eisini eru dømir um, at heilsustarvsfólk hava funnið fram kreativar loysnir. Umframt telefonviðtalur við sjúklingarnar, tá tað hevur latið seg gjørt, so eru summi øki, har viðgerðir kunnu teldustýrast, eins og sjúklingar hava fingið venjingarskráir, soleiðis at teir til dømis hava kunnað vant heima.

Heilsumálaráðið, 7. oktober 2020

Kaj Leo Holm Johannesen
landsstýrismaður